Sirkus Sandur:

# Orrustan í Klandurskotið, enn eina ferð

LEIF W. K. MORTENSEN
Sandi

Nú hildu tey flestu, at friður valdaði á Sandi, men tað vísir seg, at borgarstjórin, varaborgarstjórin og teirra trúføstu fylgisveinar ikki hava fingið nokk. Nú snýr málið seg um nakað so banalt, sum byggiloyvi til eitt bilhús.

Tværeisnar hava borgarstjórin og co. útsett fyrrverandi skrivaranum loyvi at byggja, og báðu ferðir vegna smálutir, sum lættliga kundu verið avgreiddir yvir telefon.

Eg skal verða fyrstur at viðganga, at tað er við ringum tannabiti eg yvirhøvur skrivi um eitt sovorði mál, ið eg meti vera á so lágum støði, at tað næstan ikki er vert at taka upp á tungu. Men sum flest øll vita eri eg ikki tann fyrsti at skriva um hetta mál. Henda skræpa er blivin borðreidd av øðrum manni, ið vísur seg at hava tokka til naknar mannfólkakroppar, og hevur lokalar keldur, ið eru dekan og væl informerðaðar. Men av tí at undirritaði eins og flest øll, ið hava fylgt eitt sindur við í politiska sirkusi borgarstjórans og ikki minst varaborgarstjórans, kann eg ikki lata vera við at gera nakrar viðmerkingar.

Ein er væl vitandi um, hvussu byggiloyvi hava verið latin, meðan hesin borgarstjóri hevur rátt fyri borgum, og hvussu hann somuleiðis einaferð dróg eitt misfostur kallað ein barnagarður, yvir høvdið á okkum skattgjaldarum. At hesin barnagarður hevði øll neyðug loyvi, loyvi eg mær at ivast í. Men tað vísir seg, at lógir eru ikki eins galdandi fyri okkum øll.

Sjálvur meti eg, at Sandur hevur fingið alt ov keðilig ummæli tey seinnu árini, og hesi ferð trúði eg verðurliga at friður var, soleiðis at vit kunnu hyggja frameftir og royna at skapa nakað jaligt á Sandi. Men tað vísir seg ikki, at viljin til hetta er til staðar, tá okkara kæra bygdaráð gongur á odda at skapa misstrivna og missnøgd millum bygdafólkið. Tað man verða flest øllum kunnugt, hvat hetta mál í veruleikanum snýr seg um, og var tað rætt, skuldu okkara bygdaráðslimir allir sum ein skammast at koma við tílíkum, ja, eg vil ikki siga fanaskapi, men tað er nær við.

Borgarstjórin, ið hevur nógvar titlar at goyma seg aftanfyri, hevur úttalað seg, at hann umhugsar sína støðu sum løgtingsmaður, tí sambært honum er Tjóðveldisflokkurin ikki nóg tjóðskaparsinnaður. Og vil okkara kæri borgarstjóri verða við, at hetta er tað, ið liggur honum nærmast. Hetta er tann borgarstjórin, ið rópti skrivaran hjá bygdaráðnum illloyalan, tí hon loyvdi sær at hava sína egnu meining um millum annað keypið av barnagarðinum hjá borgarstjóranum, tá hon enn var bygdaráðslimur.

Um borgarstjórin veruliga meinar, at Tjóðveldisflokkurin ikki er nóg tjóðskaparsinnaður, hví skal hann so út í fjølmiðlarnar at úttala seg um sína missnøgd, hví tekur hann ikki hetta mál upp við sínar floksfelagaðar ella sítt lokalfelag. Jú, tí maðurin hevur ikki peiling av, hvat tað merkir at vera loyalur. Sjálvandi veit hann, hvat orðið merkir, men mátin hann uppførir seg yvir fyri sínum politiska felag, og ikki minst síni heimbygd, vísir bara, hvussu nógv hann veruliga leggur í tað at vera loyalur.

Eg fari at halda sum Sjúrður Skaale skrivaði í lesarabrævi herfyri, at borgarstjórin nýtur hetta úttalilsi til enn einaferða at kunna siga, at eftur óteljandi áheitanir hevur hann valt at stilla upp til næsta val. Lat meg tó viðmerkja, áðrenn eg fari víðari, at eg skilti innihaldi í lesarabrævi Sjúrðar, og tað er nokk meir enn hvat mann kann siga um borgarstjóran á Sandi. Tí í eini roynd at vísa síni skrivikynstur, ið hann heldur kloddut kemur burturúr, staðfestur hann í aftursvarinum til Sjúrða, hví mann nýtur orðafelli “sekur at sær tekur”. Hann roynir tó at nema við kjarnan í lesarabrævinum, sum í veruleikanum snúði seg um tíðindaflutning hjá Útvarpið Føroya, har Sjúrður nýtti úttalilsi hjá løgtingsmanninum av Sandi sum dømi. Men hann blívur við at vera speiskur og brikslar Sjúrði eitt og annað, og vísur hetta bara, hvussu rætt Sjúrður hevur rakt.

Men skal eg geva borgarstjóranum eini ráð, eru tey, at hann gevst í politikki yvirhøvur. Tað hevur verið afturgongd á mest øllum økjum, tey nógvu seinastu árini, har hann hevur verið ímyndin av politikki á Sandi, og tað sær ikki út til at verða nøkur broyting á veg, hóast tað er alvorligur hákonjukturur í okkara landi. Sum eg dugi at síggja tað, er tað einans ein maður, ið hevur notið ágóðan av at vit hava henda borgarstjóra og løgtingsmann.

Politisku motiv og trúðvirði borgarstjórans og ikki minst varaborgarstjórans, máttu nú eftir hondini verið eitt ivamál millum bygdafólkið á Sandi.

# Almennar flytingar

KÁRI P. HØJGAARD
løgtingsmaður



Tá søgan einaferð skal skrivast um avrik samgongunar í valskeiðinum 2004/08 verður Flytingar ein høvuðsyvirskrift.

Nógv hevur verðið tosað um at fáa almenn arbeiðspláss út úr miðøkinum og leggja hesi í útjaðaranum. Náttúrligur er tankin, at hetta í største mun verður gjørt, tá talan var um nýtt virksemi og at ávísur fyrimunur stendst av hesum, havandi avleiðingarnar og kostnaðin í huga.

Valár er og ivaleyst verður uppgávan trupul hjá samgonguni at vísa á og prógva tey stóru politisku avrikini, framd eru hetta valskeiðið. Veljarin má merkja broytingar og framstig, um atkvøðan skal fara rætta vegin og harvið gagna flokkinum.

Tað sum hendi við fráboðaðu flytingini av Strandferðsluvirkseminum úr Tórshavn til Tvøroyri er átaluvert og átti at fingið fylgjur fyri onkran. Her er talan um alment virksemi og avgerandi broytingar í starvsfólkaviðurskiftunum, har greiðar reglur eru galdandi, hvussu fram skal farast, tá avgerandi broytingar verða framdar í setanarviðurskiftunum. Um samgongan leingi hevur arbeitt við hesi ætlan og hon var væl umhugsað, skuldi tað verið ein sjálvfylgja, at neyðugur peningur varð játtaður á fíggjarlógini til ætlaðu flytingarnar.

Mikið rok stóðst av samgonguætlanunum at flyta miðnáms-og heilsuskúlan ávíkavist úr Vági og Tvøroyri til Porkeri/Hovs. Eitt ellisheim skuldi so fylla byggibúna grundøkið í Vági, meðan Tvøroyri sat eftir við ongum.

Sera trupult hevur verið at fingið nágreinað, hvussu stór eykaútreiðslan var av hesi óskiljandi ætlan og hvørjir fyrimunir vóru við broytingini, men eitt kann tó staðfestast, talan er um tveysiffraða milliónaupphædd í eykaútreiðslum at gjalda fyri politiska ynskið hjá samgonguni. Harumframt kemur so kostnaðurin hjá kommununum í sunnaru helvt fyri ellis-og røktarheimið.

Við at leggja tvey og tvey saman, so er flytingin av Strandferðsluni og tey 20 arbeiðsplássini eitt plástur á sárið til Tvøroyri. Samstundis er tað uttan iva atgongumerkið hjá Jákup Vestergaard til løgtingsvalið komandi, ið eftir ætlan verður 19 dagar eftir at flytingin er veruleiki.

Umskipanin av Toll og Skattstovuni er líka óskiljandi. Vágar, Eysturoy og Norðoyggjar verða samskipaðar í Gøtudali, meðan deildirnar í Saltangará og Klaksvík verða niðurlagdar. Væntandi verður hendan ætlanin hjá Sambandsflokkinum og Bárði Nielsen veruleiki áðrenn 19. januar 2008.

Einaferð bleiv tosað um at leggja tænasturnar so nær borgarunum sum gjørligt, tí tað tænir borgaranum best. Er tað ikki tað ikki beint øvugta, ið nú verður framt í verki?

Embætisfólk hava rúma tíð arbeitt við at seta út í kortið eina 2015 visjónsætlan. Nú eru bert samgonguflokkarnir eftir á torginum, andstøðan metir seg verða statistar í politiskum leiki, har embætisfólk hava leiklutin at seta út í kortið, meðan politiska skipanin lurtar og ger viðmerkingar. Slagorð løgmans er “Frá file fabrikk til ide fabrikk”.

Mín áheitan á breiðu samgonguna skal verða. Støðgið á og lat skil og skynsemi valda teir mánaðirnar, eftir eru av valskeiðinum.

# Íleggingargrunnurin fyri Føroyar (ella Ríkisfelagsgrunnurin)

KAJ LEO JOHANNESEN
Sambandsflokkurin



Enn einaferð standa vit sum kánus, tá vit lesa orðaskifti sum var á fólkatingi, tá lógin viðvíkjandi íleggingargrunninum fyri Føroyar var á skránni. Tað sum undrar er, hví vit ikki bara onkuntíð kunnu standa sum ein maður á danatingi. Her hugsið eg um, at vit virða einklar demokratiskar mannagongdir, sum vit siga, at vit byggja okkar skipan á.

Enn einaferð fluttu vit føroyskan politikk niður á danating í staðin fyri at finna semjur her heima, og so standa saman úteftir. Sama skilið var, tá løgtingið viðgjørdi sama uppskotið (løgtingsmál nr 66) sum er ríkislógartilmæli um at niðurkapitalisera íleggingargrunnin við 365 mill. krónum (ikki 366, men 365 mill krónum) fyri endiliga at fara í gongd við at útbygja flogvøllin, soleiðis at vit kunnu fáa eina útbygging sum lýkur altjóða krøv, og sum ger at flogvøllurin kann nøkta tey krøv sum ferðandi seta í dagsins samfelag.

Hesin ríkisfelagsgrunnur, ella Íleggingargrunnur, ella 60 milliόna grunnur, (kært barn har mange navne) sum var stovnaður í 1964, hevur uttan iva verið største átak fyri útbyggingini av tí føroyska samfelagnum, og er tað millum annað hesin grunnur sum hevur æruna av, at vit í dag eru millum heimsins ríkastu lond. Her má sigast, at føroyskir politikarar hava verið framskygdir og hava duga at sæð tann ovurhonds stóra tørv, sum tá hevur verði til útbyggingar av samfelagnum, men sum so sanniliga eisini hevur verði væl brúktur eisini til dagin í dag.

Vegir, berghol, útbyggingin av el-orkuni og annað hava fingið fígging úr grunninum, og Atlantic Airways fekk stórt lán, sum bjargaði felagnum undan húsagangi. Bankakreppan í 90-unum fór eisini við einum stórum láni úr grunninum.

Fólkatingið játtaði grunninum tilsamans 140 mill. krónur yvir 16 ár, og við rentuvinningi er hetta blivið til eina stóra upphædd.

140 mill. krónur rindaði “vaskikonan á Vesturbrúgv” í grunnin, og tað er eisini frá henni, at Norðuratlantsbólkurin fær tann peningin, sum verður nýttur til at greiða føroyingum frá, hvussu skaðiligur ríkisfelagsskapurin (eisini Íleggingargrunnurin) skal vera fyri Føroyar.

Sosialurin
www.sosialurin.fo

# Føroyskur sendimaður í Íslandi

ÁRNI JOENSEN



Nú kjak hevur tikið seg upp um , hvørt flaggast skal við- ella uttan Dannebrog við síðuna av Merkinum á ætlaðu sendistovu føroyinga í Íslandi, kann verða viðkomandi at spyrja, hvønn persón ætlanin er at seta í hetta týðandi starv.

Hví ikki seta ein royndan mann, tá vit nú eiga hann, sum fyrsta føroyska sendimann í Íslandi.

Henda hugsan kom fram fyri meg nú eg læs at Hans Jákup Kass rundaði tey 70 árini mánadagin 5. mars og hansara drúgvu royndum í uttanríkismálum.

Íslendarar hava longu avgjørt at lata upp sendistovu í Havn og hava valt sær ein persón á sama aldri, við drúgvum royndum á altjóða diplomatiska pallinum, sum fyrsta íslendska sendimann her á landi. Einki skuldi verið meiri náttúrligt enn at seta mann við eins drúgvum- og kanska drúgvari royndum, tá vit nú eiga hann, í starv sum fyrsta føroyska sendimann í Íslandi. Er tað nakar, ið megnar at røkja eitt slíkt starv so er tað nevndi Hans Jákup Kass, ið varð so vælog beinrakið umtalaður í vikuskiftisbløðunum seinast.

Hetta vildi skapt virðing og tign um nevnda starv.

Sum eitt kuriosum kann nevnast, at tá starvið sum løgtingsins umboðsmaður varð stovnsett, varð sera skilagott valt at seta fyrrv. dómaran Joen H. Andreasen í nevnda starv fyrstu árini og eftirtíðin hevur víst okkum, at hetta varð eitt gott val, bæði fyri tignina og ikki minst fyri úrslitið.

Sera umráðandi er, at vit her fáa ein góða byrjan og er tað nakar, ið veruliga kann vísa á munandi úrslit, so er tað júst Hans Jákup Kass.